sleppa at búgva hjá honum. Hevði roknað við, at hetta var í lagi, tá ið hann ikki hevði fingið svar. "Men fanin heldur," sum hann sigur.

"Jeg maatte siden tage ind paa denne modbydelige Anstalt, og jeg blev vist ind i et Værelse, hvor 7 andre Mennesker laa og snorkede, aa, jeg var saamænd ond indvendig og tænkte hvert Øjeblik paa at flygte uden videre. Det var alt andet end hyggeligt, et laast Værelse, Vinduerne lukkede, Gardiner for, ja, jeg troede, at jeg skulde kvæles hvert øjeblik. Ved en Seng stod der nogle Krykker, ved en anden et forlorent Ben o.s.v. i den dur. Jeg lukkede selvfølgelig ikke et Øje i hele Natten."

Hann ilskast inn á mammubeiggjan Chr., sum ikki vildi hýsa honum. Dagin eftir er Egil so saman við mammuni og ommuni. Hann var annars nakrar dagar í Keypmannahavn, har hann hugnaði sær við at fara í Tivoli saman við vinum. Hann var eisini hjá tannlækna.

## Aftur á Sanatoriið

Men tann 30. juni gekk leiðin aftur á Sanatoriið. Hann var rættuliga illa fyri aftaná Keypmannahavnartúrin. Serliga hevði hann pínu í rygginum og hevði ringt við at standa á beinunum.

Tann 14. juli var útferð hjá sjúklingunum. Tey vóru í 14 bilum. Ein bilur við tónleiki koyrdi mitt í fylginum. Farið varð út í skógin, har tey fingu eina sigar hvør og eina Carlsberg. Síðan var gingið runt í skóginum, og so var farið heim aftur í góðum hýri, har eisini varð sungið. Komin heim fingu tey fyri eina ferðs skuld góðan náttúrða, heitan búff og Carlsberg, samstundis sum tónleikurin spældi í túninum.

Tann 27. juli kom landsformaðurin fyri tuberklafelagið og helt fyrilestur um "Landets økonomiske Stilling." Niðurlagið var "Sparesystem, Nationalforening og Sparesystem." "En forretningstale fra ende til anden," sigur Egil um røðuna, sum vardi í tveir tímar.

Tann 31. juli var aðalfundur í Faxinge Santorieforening. Hetta var ein rokfundur. Ein nýggjur limur "stod op og lavede ordentlig brok i den. Han læste op af en Skrivelse, der gik ud paa at vælte bestyrelsen grundet paa en masse usandfærdige Historier."

Formaðurin vísti øllum hesum aftur sum "den rene og skære Løgn". Formaðurin kravdi so eina álitisváttan frá fundinum, og tað fekk hann. Tann, sum klagaði, mátti so eisini geva eina umbering. Eftir ein slíkan fund høvdu allir fundarluttakararnir fepur.



*Ognarlutir hjá Johs. Ein heilt serligur sigarkassi, pípan og klokkan, hann brúkti, tá hann hevði brúk fyri at tilkalla tænastufólk*



*Hetta er stólur sum Faktorin, abbi Egil, hevur átt. Eigari av hesum lutum er Heri Mørkøre*

Ítrivini vóru eisini at telva og at spæla uppá grammofon, sum tá man hava verið sera forkunnugt, spæla sjónleik og so at skriva brøv, ganga túr og taka myndir.

Tann 16. august skrivaði Egil til Poul Kjelnæs, Margrethe Effersøe, kona Oliver P. Effersøe, Ingeborg Lützen, fastrina Magdalenu, abban Johan Christian og pápabeiggjan Johs. Tað er týðuligt, at tað hevur ligið væl fyri hjá honum at skriva.

Prátað varð sjálvsagt eisini við aðrar sjúklingar. Tann 17. August tosaði hann við ein sjúkling, sum kallaðist Harder. "Det var jo sidste Aften, Harder var her. "Lykkelige menneske", blot det var mig." Tað mundu vera mong, sum vóru í somu støðu.

Tann 31. august hevði ein "kandidat Nyfeldt" fyrilestur um tuberklabasilluna. Fyrilesturin vardi 2 tímar. Aftaná bar til at síggja bakteriuna forstørraða 800 ferðir.

Omman í Keypmannahavn fylti 2. september, so Egil sendir henni eitt langt bræv við myndum av sær, har hann telvaði.

Tann 3. september var rok. "Da Overlægen var Halgang var "Sukkermanden" og "Mikkel Muk" ikke inde i Hallen. Begge havde været i Præstø og kom plakatfulde hjem. "Sukkermanden" havde givet Forvalteren en blodig Tud. Selvfølgelig blev de begge fyrede og maatte tage af sted med 7 Toget næsten Morgen."

## 5. september: Boð um at fara heim

Var til Undersøgelse hos Reservelægen. Han var jo som sædvanlig meget venlig.

"Ja," sagde han, "desværre maa jeg sige dem, at der ikke har været nogen fremgang denne maaned". Det staar nærmest stille, men maa jeg ogsaa sige, at der i hvert fald ikke er mindre at høre denne Gang. Siden talte jeg med ham om Rejsen, og han raadede mig absolut til at tage af sted, thi han mente ikke, at jeg egnede mig særlig godt til disse Forhold, som der for Øjeblikket var paa Sanatoriet. Siden talte jeg med Overlægen hen paa Eftermiddagen, og vi blev saa enige om, at jeg skulde tage af sted fra Sanatoriet den 12. September. Derpaa ringede jeg til Moder og fortalte hende Aftalen. Hun var selvfølgelig som sædvanlig misfornøjet og mente, at jeg kunde have ordnet det paa en anden Maade. Men jeg sagde hende blot, at nu skulde det blive saaledes, som vi havde bestemt det.

Egil segði farvæl, fekk resept uppá millum annað opiumsdropar og havragrýn! og fór við toki til Keypmannahavnar. Fleiri av vinunum frá sanatoriinum fylgdu honum til jarnbreytastøðina. Í Keypmannahavn tók mamman ímóti honum.

Hesa ferð kom Egil at gista hjá "Onkel Chr". Her var tað "ligefrem en Nydelse" at koma í eina nossliga song.

Men hann var illa fyri. Hevði fepur, spýði og føldi seg sera veikan. Men tað var nógv at gera, áðrenn farast skuldi. Hann fór í býin at keypa okkurt, hann skuldi hava heim við, men hann var so ússaligur, at hann mátti fara til eina kiosk at ringja til mammubeiggjan Chr. at koma eftir sær.

Hevði um kvøldið vitjan av Aage Mortensen, og "vit sótu og sjóvaðu eina góða løtu."

Tann 22. skrivaði Egil til fólk, sum hann kendi á sanatoriinum, og hann ringdi eisini til onnur teirra. Hann fekk vitjan av frk. (Henriettu) Høgnesen og frk. Bærentsen. Egil skuldi fyri tær hava ein hóp av heilsanum við til Føroyar.

## Heim aftur til Føroya

Tann 23. september 1917 fór Egil, so veikur hann var, heim við ferðamannaskipi. Fyrst fór hann at siga ommuni farvæl. Hana kom hann ikki síggja aftur og so heim til mammuna, sum lá sjúk av gallsteini.

Vinirnir, sum høvdu verið um Egil, komu við umborð, har tey fingu sær eitt glas av portvíni saman. Umborð var ein hópur av øðrum føroyingum, sum eisini vóru og søgdu kenningum farvæl.

Morgunin eftir verður skipið steðgað av einum týskum kavbáti. Skiparin mátti umborð í kavbátin við sínum pappírum. Men tá ið skiparin hevði sæð hesi, sluppu tey at halda fram.

Komið var skjótt í rull, men Egil liggur í koyggjuni við fepri og lesur Maanedsmagasinet. Hann tekur aspirinpulvur og svav tí væl.

Dagin eftir er veðrið eitt sindur betri. Egil er uppi og etur morgunmat.

Teir koma so fram til Havnar tann 27. September.

"Det var slemt Vejr i Thorshavn. Peter Mortensen og jeg tog i Land med Postbaaden. Det øsregnede. Da jeg kom paa Land var jeg Dødtræt, nær ved at segne, hilste paa flere, men var dog selv helt Aandsfraværende. Faster, Johs, Sanna Kjælnes og Ingeborg Lützen tog imod mig.

Komin heim heilsaði hann abbanum, tann gamla Faktorin. "Ja, han var meget forandret i det Aar, jeg havde været borte."

## Búði á Apotekinum

Í Havn búði Egil á Apotekinum í Nólsoyarstovu saman við abbanum Johan Christian, fastrini Magdalenu og pápabeiggjanum Johs., sum var apotekari.

Vit hava fyrr havt grein um Johs í røðini Hendur ið Sleptu, men her skal skoytast uppí ein lýsing av honum, sum Eiden Müller skrivaði í sínum endurminningum "Minnislýsingar" um jólini, sum hann minnist tey sum barn:

"Tá var avmarkað, hvat ið fekst av tinganesti. Men ein serstakan dám setti gamli apotekarin Johs. Djurhuus á høgtíðina. Hann var ein gamal vinur av húsinum, og gamal drongur sum hann var, kom hann altíð til okkara at halda jól sjálvan jólaaftan aftaná kirkjutíð alt tað, sum eg kann minnast. Á apotekinum við ósan hevði hann umframt vanligar apoteksvørur eisini sjukulátu og bomm, og altíð hevði hann pakkar við góðgæti við til okkum beiggjarnar. Johs var barnavinur burturav, og manga løtuna sótu vit smádreingir allar ársins tíðir í stovu hansara, har hann borðeiddi við øllum góðum, meðan hann spældi við okkum, sjálvur sum eitt barn við reinum og opnum sinni. Hann var eitt menniskja, øll mundu vera góð við, og eg gloymi hann ongantíð.

2. jóladag var hann so leingi, sum hann orkaði, og komin um tey 70, traditionellur jólamaður í Havnar Klubba við hvørja jólatræsveitlsu. Hann var loraður í einum togi niður av loftinum gjøgnum eina lúku, og frøin var stór á børnunum, tá ið Johs við posanum og øllum gávunum kom niður á gólvið og fór at býta